# Isle of Skye – ein spírandi vitanaroyggj

Isle og Skye - oyggin Skye er størsta oyggin í skotska oyggjabólkinum Innaru Hebridunum. Oyggin, ið liggur beint innanfyri Ytru Hebridirnar – ella Suðuroyggjar, ið føroyingar plaga at kalla tær – er serliga víðagitin fyri whisky-virkið Tallister. Men Oyggin Skye er eisini ein gomul mentanaroyggj, ið hóast hon telur minni enn 10.000 fólk, hevur sítt egna fróðskaparsetur, Sabhal Mòr Ostaig.

Í døgunum 11. til 14. mai var ein bólkur av føroyingum á vitjan á Isle of Skye. Við í ferðalagnum vóru millum annað Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, Óli Jacobsen, fyrrverandi formaður í Fiskimannafelagnum, og Jóan Paula Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya.

Millum annað var føroyska ferðalagið á vitjan á Fróðskaparsetrinum Sabhal Mòr Ostaig. Hetta Fróðskaparsetrið er stovnsett við eini líkandi grundgeving sum Fróðskaparsetur Føroya á sinni varð grundað á, nevniliga at menna og styrkja mál, mentan og mentanararv. Hetta verður gjørt við at bjóða út ymiskar lærugreinir í gæliskum máli, umframt við at vera ein aktivur leikari í samfelagslívinum á Oynni Skye.

Sabhal Mòr Ostaig er ein partur av UHI-samstarvinum, ið er eitt samstarv millum fimtan vitanarstovnar í regióni Higlands and Islands um at bjóða fram útbúgvingar- og granskingarmøguleikar í regiónini. Umframt hetta skal Fróðskaparsetrið á Skye vera við til at betra um búskapin á oynni og harvið at økja um fólkatalið í oynni, ið var niðri at venda á einans 7.000 fólkum í 70'árunum.



*Sabhal Mòr Osteig – Fróðskaparsetrið á Skye. Rundi bygningurin høgrumegin eru studentaíbúðir*



*Isle of Skye – stóra oyggini mitt á myndini – liggur skamt á skotsku eystrustrondini. Ytru Hebridirnar liggja uttanfyri og verja móti Atlantshavinum*

### Útbúgving og gransking – ella bara áhugi

Millum lærugreinarnar, ið verða boðnar út á Sabhal Mòr Ostaig eru kommunikatión, fólkatónleikur, mál og mentan, norðuratlantsfrøði og fjølmiðlafrøði, ið eru á bachelorstøði. Eisini er masterlestur í fólkalívsfrøði og umhvørvisfrøði.

Umframt hetta ber sjálvandi eisini til at læra gæliskt heilt frá botni, eins og til ber at taka skeið í gæliskum tónleiki og dansi.

Jóan Pauli Joensen, ið var millum gestirnar á oynni Skye, heldur, at føroyingar eiga at troyta møguleikarnar fyri at taka stytri ella longri skeið á Sabhal Mòr Ostaig.

- Tey sum standa fyri Sabhal Mòr Osteig eru sera áhugaði í at fáa føroyngar at koma at lesa á fróðskaparsetri teirra í eitt tíðarskeið, greiður Jóan Pauli frá.

- Teir hava góðar studentabústaðir og eitt yvirskot av studentaíbúðum, so har er lætt at fáa innivist.

Við 30 búplássum til studentar, hevur Fróðsparsetrið á Skye góðar møguleikar at bjóða fólki at vitja stytri tíðarskeið. Meiri kann lesast um útbúgvingarmøguleikarnar á www.smo.uhi.ac.uk.

- Fróðskaparsetur Føroya vil sýn lesandi vælvild, um lesandi vilja nýta skeið frá Fróðskaparsetrinum á Skye sum part av teirra útbúgving á Fróðskaparsetrinum, sigur Jóan Pauli Joensen. ECTS stig vilja vanliga verða latin í mun til longdina á skeiðinum.

Stuðul verður latin til ferðing, uppihald og lestur eftir vanligum reglum. Fróðskaparsetur Føroya og Altjóða Skrivstovan eru altíð til reiðar at hjálpa áhugaðum við umsóknum og øðrum praktiskum.

### Gælisk mentan og Føroyar

Skye hevur fast samband við skotska meginlandið, og Fróðskaparsetrið liggur sunnast á oynni, haðani til ber at koyra fram við kenda vatnið Loch Ness til Inverness – høvuðsstaðin í Higlands við skotsku eysturstrondina. Uppaftur nærri, stutt sunnanfyri Skye liggur býurin Fort William við skotsku vesturstrondina. Frá norðurendanum av oynni Skye ber til at sleppa við ferju út á Ytru Hebridirnar.

Skye hevur mangt og hvat at bjóða. Oyggin er kend fyri sín náttúruvakurleika, sína søgu og sítt djóralív. Tí er oyggin í sær sjálvum verd. eina longri ella stytri vitjan. Men at tað eisini finst eitt Fróðskaparsetur á oynni, ger at oyggin er tvífalt áhugaverd. Fyri málfrøðingar, fornfrøðingar og søgufrøðingar er tað upplagt at leita sær til Skye Sabhal Mòr Ostaig at nema sær førleika í gæliskum. Hetta er bæði galdandi fyri útbúnar frøðingar, ið vilja læra nakað nýtt og – ikki minst – fyri lesandi, ið hava áhuga fyri at granska keldur, ið einans eru tøkur á gæliskum máli.

Hesi seinastu árini hava søgu- og fornfrøðingar ávíst, at sambandið millum norðbúgvar og keltisku fólkasløgini í Skotlandi og Írlandi hevur verið størri og meiri jaligt enn vit higartil hava hildið. Vanliga fatanin av at norðbúgvar og keltar einans hava ligið í orrustu við hvønn annan, vísir seg at vera ósonn. Stóru málsligu og fornfrøðiligu leivdirnar av keltiskari mentan í Føroyum benda á, at norðbúgvar hava samskift og handlað nógv við keltar.

